# Barometrið II



*Bæði sum fyrireiking til komandi summarið og sæð í ljósinum av, at eingin sól var á himlinum, fór manningin í Barometrinum undir kunst-igu sólina eina løtu. F.v. Bjarni Mohr, Heri Jakobsen, Elin H. í Stórustovu, Rúni Jákupsson og Kári Sólstein*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Manningin í útvarpssendingini Barometrið er til reiðar til enn eitt summar við útvarpssending av tí muntra slagnum. Sendingin og manningin líkist sær sjálvari, men í ár er ein kvinna fastur partur av manningini**

SENDING
*Heri á Rógvi*

Helst best umtókta summarsending seinnu árini, Barometrið, verður aftur at hoyra í summar. Lætta summarsendingin við vertununum, tú legði merki til, verður at hoyra fýra dagar um vikuna, týsdag til fríggjadag, frá 10. juni til 5. september.

Fýra vertir fara at vera hvønn dag — tveir úti og tveir heima í studio. Og hesaferð er ein kvinna fastur partur av manningini.

Og hetta er nakað, sum merkist. Teir mannligu vertarnir kappast mestsum at stoyta sínar viðmerkingar yvir á einasta kvinnuliga vertin. Sum kortini ikki hevur ringt við at kasta viðmerkingar av sær aftur. Men lagið er øgiliga gott. Tey hugna sær rættiliga, nú fyrireikingarnar av álvara eru farnar ígongd til eitt summar við einari útvarpssending av tí muntra slagnum, sum tann eini verturin so fegin vil kalla tað.

Kvinnuliga íslettið í ár er Elin Hentze í Stórustovu. Hon er 24 ára gomul og hevur áður verið at hoyrt hjá Rás 2 og í Atlantic Radio í sínari tíð.

Menninir eru teir somu sum í fjør: Kári Sólstein, 28 ár, er fastur í Útvarpi Føroya og fæst mest við barnaútvarp. Bjarni Mohr og Rúni Jákupsson eru báðir 29 ára gamlir og teljast óivað millum tær meira kendu útvarpsrøddirnar. Aldursforsetin er Heri Jakobsen við sínum 37 árum. Í fjør summar setti hann sítt sermerki á føroyska landslagið við einum ógvuliga líkatil stíli.

Elin í Stórustovu skal út fyri tað nógva vera úti í markini, og tað er nakað, hon gleðir seg til, sjálvt um spurningarnir kunnu gerast alternativir viðhvørt.

– Mær dámdi sera væl sendingina í fjør, og eg eri satt at siga errin av at kunna vera partur av sendingini í ár, sigur Elin H. í Stórustovu.

## Nógv tað sama

Í tí stóra og heila líkist sendingin í ár rættiliga nógv konseptinum í fjør. Stílurin verður tann sami, men ymsar broytingar eru gjørdar.

Tónleikurin verður fyri tað nógva í tí nýggja lættara endanum, og tað verða innsløgini somuleiðis.

Tann so kenda firmakappingin verður aftur á skránni. Sostatt skal tann gløggasta fyritøkan í Føroyum finnast á øðrum sinni. Og aftur í ár bíðar ein góður vinningur eftir starvsfólkunum hjá vinnandi fyritøkuni.

Kappingin er eitt sindur broytt, soleiðis at spurningarnir verða blandaðir. Hetta skal skiljast soleiðis, at tað ikki longur er fastlagt, hvør raðfylgjan av spurningum verður, men liðini skulu velja sær eitt tal, sum so vísir til ein tilvildarligan spurning. Hesir góðu spurningar eru kortini ikki heilt ólíkir í evni og torleika.

Kenn tín maka verður eisini somuleiðis aftur á skránni. Hetta er kappingin, har eini hjún ella eitt par verður spurt nærgandi spurningar um hvørt annað.

Hinvegin er Internet-kappingin tikin av skránni. Ætlanin er at nýta fríggjadagarnar til ymisk events, sum væl kann umsetast til hendingar ella tiltøk. Hetta skal alt verða skemtilig tiltøk.

Annars verður eisini nógv gjørt við heimasíðuna, har m.a. myndir fara at liggja og eitt webcam fer at vísa fólkið, hvussu vertirnir hóreiggja sær í studioinum.

## Væl umtókt

Tað er lítið at taka seg aftur í, at sendingin Barometrið gjørdist framúr væl umtókt í fjør. Ongar beinleiðis lurtarakanningar eru gjørdar, men eitt nú heimasíðan hevði 84.000 vitjanir í fjør summar. Men nógvu lurtararnir eru ikki orsøkin til, at tey hava valt at halda fram.

– Tað er ótrúliga stuttligt fyri okkum at gera hesar sendingarnar. Eg haldi ikki, at tað var ein dagur, har vit ikki høvdu tað stuttligt, sigur Bjarni Mohr, sum sjálvur saman við Rúna Jákupsson var upphav til Barometrið.

– Vit hava meira ella minni vita allatíðina, at vit fóru at gera eitt umfar afturat, og tí hava vit snakkað nógv saman í vetur. Men tað er eingin meining í at gera júst tað sama ella nakað verri, tí hava vit gjørt nakrar broytingarnar, siga teir tríggir, Kári, Bjarni og Heri.

– Men hetta er ikki voksið nøkrum yvir høvdið. Einki er givið áðrenn, sigur Heri Jakobsen.

Tað er eisini ein satsing hjá Ùtvarpi Føroya við einari tílíkari sending, ið merkir fýra fólk fulla tíð alt summarið.

## Kring landið

Ein annar munur við sendingunum í ár í mun til í fjør er kanska, at ætlanin er at fara meira út um alt landið. Manningin hevur fingið hendur á einum serligum bili, sum skal føra teir báðar reportararnar kring landið.

Tey øll fimm verða ikki at hoyra allatíðina í senn, tí ætlanin er, at ein teirra allatíðina skal vera í feriu. Hendan dagin, vit hava savnað tey, gongur leiðin í Sólborg á Argjum, har tann kunstiga sólin gevur hitan, veðurgudarnir fjala hendan dagin.

Og tey trívast væl í hesum selskapinum. Ikki bert undir sólini, men saman við hvørjum øðrum.

Sambært Hera Jakobsen er tað eisini ein fyrimunur, at tey eru í einum meira búnum aldri.

– Tað hevur stóran týdning, at tað eru vaksin fólk, sum gera sendingini. Vit kunnu bæði tvætla og skemta og tosa um nógv ymisk evni, sigur Heri Jakobsen, sum lovar at halda áfram við leitanini eftir G-stronginum, hann ongantíð fann síðsta summar.



# Verkfallið: Arbeiðsgevarar til reiðar at tosa um undantøk

**Hóast arbeiðsgevararnir hava stongt heilsølur og oljusølur, eru teir til reiðar at tosa um at lata uppaftur í einstøkum førum, skuldi ein neyðstøða tikið seg upp**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Blokadurnar hjá arbeiðarafeløgunum førdu við sær, at arbeiðsgevararnir stongdu oljusølurnar og heilsølurnar. Eftir sita suðuroyingar við svartaperi, sum teir eru vanir, tá ið verkfall er*

– Er talan um eina neyðstøðu, eru vit sjálvsagt til reiðar at viðgera tað.

Jan Mortensen, á arbeiðsgevarafelagnum er ikki heilt knívskorin, hóast arbeiðsgevararnir herdu verkfallið mitt í vikuni, tá ið teir stongdu bæði oljugymslur og heilsølur.

Arbeiðsgevararnir siga, at blokadurnar hjá arbeiðarafeløgunum førdu við sær, at heilsølur og oljusølur ikki fingu arbeitt, hóast talan ikki var um verkfalsrakt arbeiði og tí gjørdu arbeiðsgevararnir av bara at stongja heilt.

Arbeiðarafeløgini siga, at blokadurnar eru fyri at tryggja, at verkfalsrakt arbeiði ikki verður gjørt, men at tey hava gjørt undantøk til ávís endamál, eitt nú strandfaraskipini og mjólk.

Tí uppfata tey tiltakið hjá arbeiðsgevarunum at stongja oljugoymslur og heilsølur, sum verkbann.

## Kunnu geva undantøk

Men Jan Mortensen sigur, at hóast oljusølur og heilsølur eru stongdar, merkir tað ikki, at undantøk ikki kunnu gevast.

– Sjálvsagt fara vit at viðgerða umsóknir um undantøk til sjúkrahús, ellis- og røktarheim, sambýli og aðrar stovnar, har lív og heilsa stendur uppá spæl og tað er bæði, hvat olju og provianti viðvíkur.

Og hann leggur afturat, at er ein sjúkrabilur, brandbilur ella politibilur, sum manglar brennievni, skal hann eisini fáa tað.

Men so er tað mjólkin.

Jan Mortensen vísir á, at mjólkarvirkið er ikki umfatað av verkfallinum.

– Men kemur tað hartil, at bilarnir, sum koyra mjólk, onga olju hava, finna vit saktans út av tí eisini.

Hinvegin heldur Jan Mortensen, at olja til smyril og hini strandfaraskipini, er ikki neyðsynjarvøra.

Sostatt tykist ikki sum um at støðan er stórvegis broytt, síðani oljugoymslurnar og heilsølurnar stongdu.

Men ein stór broyting er tó, og hon er, at í annaðkvøld verður Smyril lagdur og sostatt sita suðuroyingar aftur við svartaperi- sum teir plagdu, tá ið verkfall er. Jan Mortensen sigur, at talan er ikki um verkbann.

– Verkbann er, tá ið arbeiðsgevarar vraka eitt semingsuppskot. Tað, at fyritøkur lata aftur, tí at tær ikki fáa arbeitt undir einum verkfalli, er ikki verkbann.

Hinvegin leggur hann dent á, at í somu løtu sum arbeiðarafeløgini gevast við blokadunum, verða bæði oljugoymslur og heilsølur lætnar upp aftur.

# Verkfallið: Hans Joensen vil hava undirskriftir á borðið

**Teir, sum havt kravt limafund í Havnar Arbeiðsmannafelag um verkfallið, fáa ikk sín vilja við góðum**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Hans Joensen, formaður, vil ikki hoyra talan um, at Havnar Arbeiðsmannafelager viknað eftir at nakrir limir hava kravt limafund um verkfallið. Og sjálvur er hann komin styrktur burturúr støðuni, tí enn er ivasamt, um teir ið vildu hava fundin, hava fingið undirtøku*

Tað verður eftir øllum at døma ongin limafundur í Havnar Arbeiðsmannafelag, soleiðis, sum summir limir hava kravt.

Mikudagin kravdu nakrir limir í Havnar Arbeiðsmannafelag annars at fáa limafund at viðgera støðuna, nú felagið er í verkfallið.

Av av stigtakarunum, Jón í Dali, sigur, at teir hava varhugan av, at undirtøkan fyri verkfallinum er ikki so stór, sum menn vildu vera við og tí vildu teir hava limafund fyri at skatta dýpið.

– Vildi nevndin í havnar Arbeiðsmannafelag ikki kalla saman til fundar, fóru teir at savna inn undirskriftir fyri at fáa eykaaðalfund, gjørdu teir greitt mikudagin.

Men formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, Hans Joensen, ger í dag greitt, at nevndin í Havnar Arbeiðsmannafelag fer ikki at kalla saman til fundar.

Hann sigur, at vilja limir hava fund, skulu teir koma við teimum neyðugu undirskriftunum fyri at fáa eykaaðalfund, tvs. 25 undirskriftum.

Men hann heldur ikki at tað er rætt, at limirnir ikki eru komnir til orðanna.

– Vit høvdu ein stóran fund fyri øllum limunum í arbeiðarafeløgunum í verkfalli í Ítróttarhøllini henda dagin. Har var undirtøkan fyri verkfallinum 100%. Tað var ikki ein einasta atfinnandi rødd at hoyra, heldur ikki frá teimum, sum nú vilja hava limafund, sigur Hans Joensen.

Hann sigur eftir at nevndin hevur gjørt greitt, at hon fer ikki at kalla saman til fundar, hevur hann skilt, at ætlanin at savna inn undirskriftir, dottin niðurfyri

Hann sigur, at so vítt hann veit, eru teir, sum hava kravt fundin, menn, sum forvinna væl meiri enn sáttmálalønina.

Men hann heldur, at tað er hugstoytt, at menn stinga nevndina í ryggin, tá ið stuðulin kring alt landið er 100%

– Men hetta er als ikki tekin um, at kinkur er komin í hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, tí samanhaldið er enn 100% og tað sær heldur ikki út til, at teir fáa tær neyðugu undirskriftirnar.

Beint fyri evstamark í gjár, hevði Jón í Dali als onga viðmerking til støðuna.

## Vóru ivaleysa nógvir

Hann segði annars mikukvøldið, at arbeiðsmenninir aftanfyri kravið um limafund vóru ivaleysa nógvir í tali til at teir kundu krevja eykaaðalfund, vildi nevndin ikki kalla saman til fundar.

Hann segði, at einasta endamálið við hesum er, at teir vilja vita um limirnir í Havnar Arbeiðsmannafelag taka undir við verkfallinum og tí, sum nevndin hevur gjørt í hesum sambandi.

Sjálvur heldur hann ikki, at nevndin hevur ráðført seg nokk hjá limunum, tí teir eru ongantíð eftirspurdir, heldur ikki um Havnar Arbeiðsmannafelag yvirhøvur skuldi fara saman við hinum feløgunum til samráðingar.

Sjálvur hevði Jón í Dali varhugan av, at limirnir í Havnar Arbeiðsmannafelag taka ikki undir við verkfallinum, tí teir vísa á, at verkfallið eisini kostar teimum nógv í løn.

Men hann sigur, at tað eigur at verða staðfest á einum limafundi, um limirnir taka undir við nevndini, ella ikki.

Hann helt, at tað var ein spurningur, um ikki Havnar Arbeiðsmannafelag skuldi samráðst fyri seg sjálvt.

Men hann legði eisini dent á, at hevði ein limafundir tikið undir við verkfallinum, skuldi hansara loyalitetur ikki liggja eftir.

– Men eru limirnir ímóti tí, taka teir heldur ikki undir við tí. Og so er støðan ein onnur og so eigur felagið at taka støðu eftir tí, leggur hann afturat.

# Verkfallið og mjólkin: Klára seg tað mesta av næstu viku

**Bilarnir, sum koyra mjólk, hava olju eftir til tað mesta av næstu viku og stendur verkfallið við tá, verður undantak givið, men suðuroyingar fáa onga mjólk**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Nú arbeiðsgevararnir hava stongt oljugoymslur og heilsølur, hevur verkfallið tikið eina nýggja vend.

Arbeiðarafeløgini í verkfallið, høvdu givið nøkur undantøk frá verkfallinum, eitt nú høvdu skipini hjá Strandferðsluni fingið loyvi at bunkrað olju og proviant so at tey kundu sigla ótarnað og bilarnir, mjólkarvirkið hevði fingið undantaksloyvi til at avgreiða vanligu mjólkina, eins og bilarnir, sum flyta mjólkina, hava fingið undantaksloyvi til at fáa olju.

Men nú oljugoymslurnar eru stongdar, er tað bara ein spurningur um tíð, til eisini hetta liggur lamið.

Smyril verður lagdur í annaðkvøld.

Men mjólkarneyð verður ikki kortini, í hvussu so er ikki í tí mesta av landinum.

Eirikur Thorvaldsen, stjóri á mjólkarvirkinum, sigur, at bilarnir hava olju eftir til tað mesta av næstu viku eisini og so leingi verður mjólkin í hvussu so er heintað.

Men hann mjólkarflutningur til Suðuroyar verður ein trupulleiki, tí Smyril verður lagdur í annaðkvøld og so fæst ongin mjólk suður.

Hann vónar bara, at handilsfólkini í Suðuroy eru so mikið fyrivarin, at tær bíleggja ríkiligt av mjólk ímeðan tíð er, so at hon strekkir eitt sindur.

– Mjólkin er so mikið góð, at verður hon goymd í kulda alla tíðina, heldur hon sær í einar 10 dagar, kanska enntá í 25 og kanska uppaftur longri.

– Men skal hon halda so leingi, er tað ein avgjørd treyt, at kølingin ikki svíkur eina løtu, so at mjólkin ongantíð sleppur at hitna nøkur stig.

Hinvegin sigur Jan Mortensen á arbeiðsgevarafelagnum, at koma mjólkarbilarnir fyri olju, finna teir uttan iva út av at geva teimum undantaksloysi.